# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Astri Luihn í Galerie Focus

Fríggjadagin 5. september kl. 16 til 18 letur ein framsýning við verkum hjá Astri Luihn upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn. Astri Luihn er útbúgvin MA á universitetinum í Olso.

Bæði tónleikurin og grafikkurin hava fylgt henni frá barnsbeini. Í dag er tað grafiski miðilin hon í høvuðsheitum brúkar í listini.

Tøknið er træ og linoliumsskurður. Tað er sjálvt tann útskorna og málaða plátan sum er listaverkið, ikki eitt prent av plátuni. Ein sjálvstøðug rytma er í myndunum og myndevnið er sum oftast fuglar, fuglarøkur og aðrir figurar

Framsýningin verður opin til 17. september, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.




*Fríggjadagin 5. september letur ein framsýning við verkum hjá Astri Luihn upp í Galerie Focus*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Poula Larsen, fødd Leo, ættað úr Toftalíð í Vági**, búsitandi í Keypmannahavn, andaðist sunnudagin á Hvidovre Sjúkrahúsi, 99 ára gomul.

**Ása Olafsdóttir Weihe, fødd Reinert**, fer til gravar úr Vesturkikrjuni hósdagin 4. september klokkan 13.

**Mia Olsen, vanliga nevnd Mia hjá Jóhan (Djóan)**, ættað av Tvøroyri, andaðist í Keypmannahavn sunnumorgunin 91 ára gomul.

Dagurin

4. september. Teodosia. Navnið er helst komið upp í álamanakkan í staðin fyri mansnavnið Teodorius, tí at hann hevði longu 2. apríl sum halgidag.

## Realskúlaflokkur í 1964

Mynd frá "Realskúlaframsýningini 1916-66", sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er tikin í 1964 í Sandágerði av næmingum í 1.C í Realskúlanum saman við læraranum Jógvan við Ánna.

**Aftasta rað f.v.:** Elmar Højgaard, Bogi Michelsen, Maria Mortensen, Rannvá Lindarstein og Anna Katrina Næs Joensen (Dukki).

**Miðraðið f.v.:** Ólavur Michelsen, Peddy Davidsen, Jógvan við Ánna (lærari), Olga Olsen og Steingrím Abrahamsen.

**Fremst f.v.:** Bergur Djurhuus, Bjartur Dalsgarð, Karsten Simonsen, Johan Jacobsen og Regin Hentze.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024.

*Myndaeigari: Peddy Davidsen*

